


*Martha Larsen hevur altíð verið í sving – bæði til verkligt arbeiði og tá tað snúði seg um handaligt arbeiði. – Eg dugi ikki at sita niðri og einki gera, sigur 72 ára gamla kvinnan, sum hevur búð meginpartin av lívi sínum í Føroyum. Í bakgrundini sæst maðurin, tann 79 ára gamli Dánjal Larsen*

dámdi mær beinanvegin bæði landið og fólkið.

– Tað var sera spennandi at síggja, hvussu onnur fólk livdu. Og Havnin hon var nógvar ferðir minni, enn hvat hon er í dag, og tí var tað nógv lættari at finna runt í býnum, greiðir Martha frá.

Hon var heppin og fekk arbeiði, og næstu fýra árini arbeiddi tann ídna Martha, og kom tá eisini at kenna aðrar kvinnur úr Grønlandi sum arbeiddu her. Tað var kortini eitt sum so líðandi kom at merkja hana: Longsulin eftir heimlandinum. Hetta nevndi hon somuleiðis fyri Dánjali.

– So sigur hann við meg ein dagin: – Altso, Martha, góða. Um tær leingist aftur til Grønland, so haldi eg at tú skalt fara heim aftur, greiðir hon frá.

– Men so legði hann aftrat: Kom aftur um tvey ár.

## Dugdi ikki føroyskt

Martha fór so aftur til Atammik, men tá hon hevði verið har gekk veruleikin upp fyri henni: Satt at siga vóru bæði hon og heimbygdin broytt so mikið nógv, at hon ikki rættiliga treivst her.

– Ja, eg dugdi faktist ikki at vera her, sigur hon álvarsom.

Í Nuuk vóru øðrvísi umstøður, og her fekk hon aftur arbeiði tey næstu tvey árini. Henda tíðin gekk skjótt, her hon millum annað arbeiddi á flakavirki og á eini matstovu, meðan hon visti, at Dánjal sigldi úti í verðini.

Tey bæði royndu samstundis at halda sambandið viðlíka, men tað var sjálvandi ikki so lætt fyri 50-60 árum síðani. So mikið glaðari gjørdist hon, tá hon ein dagin fekk eina hjartaliga uppringing frá Dánjal: – Martha, eg komi til Grønlands eftir tær. Og so fara vit aftur til Føroyar.

– Eg kom so til Føroyar, men segði so við Dánjal: Jamen, eg dugi ikki føroyskt og illa danskt. Hvat skal eg kunna gera, um eg ikki dugi málið?

– Eg veit ikki rættiliga, men stutt eftir ringdi ein sum vit kendu, og segði seg hava brúk fyri míni hjálp í matstovuni hjá Magnusi Bærentsen, – tað er har sum Keypsamtøkan í býnum er í dag.

## Mátti velja

Tað lá væl fyri hjá teirri arbeiðssomu Marthu at arbeiða og finna sær arbeiði. Tí áðrenn hon visti av, hevði hon eisini fingið arbeiði í matstovuni Perluni:

Her arbeiddi hon um dagin, meðan hon um kvøldið arbeiddi á Bacalao, har teir turkaðu fisk.

– Mær dámdi sera væl at arbeiða í fiski, og uppá eitt tíðspunkt mátti eg velja annað teirra. Eg kundi ikki arbeiða longur á báðum støðum samstundis. Eg valdi Bacalao, tí vit tjentu so væl, ikki minst tí at vit arbeiddu nógv yvir, um kvøldið og um náttina.

– Seinni byrjaði eg at kílaskera, og frá 1. juni 1966 fekk eg fast á Bacalao.

Martha var hepnari enn sum so, tí seinni vóru eisini boð eftir Dánjali, sum gjørdist formaður í saltfiskahúsinum.

– Tað var nokkso skeg, tí vit vórðu eisini gift tá – og tá eg hevði arbeitt á virkinum í 25 ár, hildu vit bæði silvurbrúdleyp og 25 ára starvsdag mín ísenn.

– Tað stuttliga var eisini, at tá bleiv flaggað á Bacalao.

*snorri@sosialurin.fo*